Nólsoyarfundurin.

Eftir *Sverra Dahl* og *Jóannes Rasmussen.*

I.

Soleiðis eru fornleivdir nevndar, ið komu undan mónum *á Malarenda* heystið 1926. Hesar leivdir vóru bein av ymiskum djóraslögum og hópur av rekaviði. Fundurin hevur verið nógv umrøddur millum manna og í blaðinum *F. F.*[1] og *Løgtingssögu Föroya*[2] eru gjøllar skrivligar frágreiðingar at finna. Við tað at tíðin nú er so long ímillum at hetta kom fram og tær rannsóknir, sum her skulu sigast frá, skulu vit loyva okkum í fáum orðum at endurtaka tað, sum fyrifórst tá.

Á heysti 1926 gjördu Nólsoyingar veg út á Malarenda og komu tá fram á rekavið og ymisk djórabein, har skilligt var, at mannahond hevði verið á. Hetta varð fyri ein part tikið til varða, men arbeiðið varð fullfört, og vegurin tikin í brúk uttan at nökur rannsókn var gjörd á staðnum av jarðlögum ella fundarumstöðum.

Seinri, tá ið tíðindini um fundin spurdust, vóru lutirnir latnir *R. Rasmussen,* háskúlastjóra, í hendi og sendi hann teir til Danmarks Geologiske Undersögelse við frágreiðing um fundarumstöðurnar, soleiðis sum menn aftaná hildu tær hava verið. Eftir frágreiðing sóknarstýrisformannsins, *Poul Juul Thomsen,* varð grivið 2½—3 m niður á fastan botn. Leivdirnar vóru funnar 3 m undir svörðinum og á hellu. Ein sköltur lá okkurt um ein m upp av helluni, men kortini meira enn 1½ m undir svørðinum og í mógvi.

Knud Jessen, professari (táverandi Afdelingsgeolog við Danmarks Geologiske Undersögelse) fekk leivdirnar kannaðar av serfröðingum og greiddi í brævi frá rannsóknarúrslitinum.[2]

Beinini segði hann at vera:

Okse (Bos taurus domesticus brachyseros); et Kranie af den saakaldte Dværgokse, en lille og spinkel Race, med en lille Knude mellem de to korte Horn. Denne Races Knogler er fundne f. Eks. i Schweitz, England, Danmark, Sverige og nu altsaa Færöerne, men ingen Steder under saadanne Forhold, at man kan antage den for en vild Race. Den stammer utvivlsomt fra meget tidlig tæmmede Urokser (Nordman). Desuden en Kæbe.

Tamsvin, et Skulderblad (det med den böjede Kam) af et lille Svin.

Hest, et Skulderblad af en lille Hest.

Hval, Hvirvlerne er endnu ikke bestemt.

Planteresterne:

Det tilsendte Stykke Drivtömmer er af Gran *(Picea)*.

Slæmningen af den Törvepröve, som De har vedlagt, gav:

Empetrum nigrum, 2 Frugtsten.

Hippuris vulgaris, 16 Frugtsten.

Montia rivularis, 2 Frö.

Potamogeton polygonifolius, 2 Frugter.

Potamogeton cfr. filiformis, 1 Frugt.

Potentilla erecta, 4 halve, 1 hel Frugt.

Ranunculus flammula, ca. 12 Frugter.

Ranunculus repens, 3 Frugter.

Rumex acetosa, flere Blomsterblade.

Mytilus sp., et lille Stykke Skal inde i Törvemosen.

Um jóltíðir 1933 rótaði brimið aftur ymsar lutir upp. Hesar tók *frú Petra Djurhuus* til varða, og sendi hon teir til Zoologisk Museum í Köbenhavn, har súgdjórafröðingurin

Dr. Degerböll hevur umfarið teir og greiðir hann soleiðis frá[2].

»Den store Knogle er Del af Overarmen af en stor *Hval*, utvivlsomt Nordkaper *(Balaena biscaiensis)*.

Saa er der Dele af to Hovedskaller af en lille *Ko (Bos taurus brachyceros* eller *Longipons)*. De ældste Rester af Tamko i Europa (fra Schweitz og Danmark) fra yngre Stenalder, maa henregnes til denne Race. Senere har Racen haft vid Udbredelse i Europa. De Dyr, der i Nutiden staar den nærmest, er Balkanhalvøens Köer. Ogsaa Jerseykoen slutter sig hertil.

Endvidere er der Dele af to Hovedskaller af *Faar*. Den ene med nogenlunde hel Stejle, af gedehornet Race. Den anden med större og udaddrejede Horn.

De spörger om, hvorfor kun Hoveder findes. Jeg formoder, at man har bortkastet Hovederne som værdilöst Stof i Modsætning til Krop og Lemmer.«

Uppaftur seinri, í 1936, varð grivið í sjóvarmálanum niðanfyri vegin. Eisini tá komu fram ymisk djórabein; hesi segði Dr. Degerböl at vera av seyði, neyti, hundi, kópi og fugli. Hesar upplýsingar hava vit fingið frá frú *Petru Djurhuus*, ið sigur, at bróðir hennara *Niels á Botni* stóð fyri hesum grefstri.

Í Lögtingssögu Föroya roynir *A. W. Brögger, professari*, at meta um aldurin á hesum fundi, men sum hann sjálvur tekur til, verður virðið av frágreiðing hansara avmarkað við tað at eingin kön rannsókn av mónum var komin í lag tá. Hann hevur tí bert haft frásögn teirra, ið arbeiddu á staðnum, at halda seg til, og um hon er bein, heldur hann, at öll líkindi eru til, »at hesir djórasköltar eru *grivnir niður* í tann gamla mógvin, og tað tí er líkast til, at fundurin er ein *offurfundur*, og at hann kann vera frá fyrst í *landnámstíðini*.«

II.

Tær kanningar, sum nú skal sigast frá, fóru fram í døgunum 11.—13. august 1953. Tað var *Nólsoyar Forngrefstrarfelag*, ið hevði fingið hesar kanningar í lag, og bar felagið allan kostnaðin av sjálvum grefstrinum. Framhaldandi kanningar vóru gjørdar á *Føroya Fornminnissavni* og *Föroya Jarðfröðisavni*.

Malarendi er lendi vestantil á Nólsoyareiði, frá ánni og suður á tangan. Hvussu hetta lendið fyrr hevur verið vorðið,



1. ljósmynd. Malarendi sæddur norðan.
Malarendi looking south.

skulu vit gita um seinri; men nú gongur vegur allan vegin suður við strondini, og er hetta vegurin, gjørdur varð í 1926. Niðanfyri vegin er stoyptur sementgarður, um leið 2 m högur og uttanfyri hann gongur möl oman móti sjónum. Út frá landi eru har tvær hellur, *Malhella* og *heimara Malhella*, einar 30 m eru millum hesar hellurnar (1. ljósmynd).

Eftir frásøgn teirra, ið enn vistu at siga frá vegarbeiðinum í 1926, vóru flestu beinini funnin beint undir, har garðurin nú er, og beint uttanfyri. At grava uttanfyri var ikki gjørligt hjá okkum, staðið liggur undir flóð, og bæði hava brimið brotið upp og fólk grivið á staðnum síðan fyrra fundin. At bróta garðin av og leita heimeftir bar heldur

ikki til, hetta vildi gjört arbeiðið ov drúgvt og tí komið at tarna vegasambandinum suður eftir ov mikið.

Grefsturin fór tí soleiðis fram: Frá sementgarðinum varð

2. ljósmynd. Malarendi, skurður E—V, sæddur vestan.
Malarendi, section E—V, looking east.

grivið tvörtur um vegin og á botn. Skurðir E—V og N—S vórðu mátaðir, og vórðu jarðlögini kannað á staðnum so gjölla, hetta nú var gjörligt.

SKURÐUR E—V (1. og 2. mynd). Á fyrstu mynd sæst skurðurin E—V úr niðara vegjaðara (sementgarðinum) og niðan í hamarin oman fyri húsini á Malarenda (2. ljós-

mynd), hetta eru o. u. 18 m. Økið, har grivið var á botn, sæst við jarðlögum tilskilaðum á 2. mynd.

Niðast er hella (*a*), hon gongur við lítlum halli oman móti sjónum. Tilfarið í helluni er sama slagið, sum sæst um alt eiðið: hetta er gosillska ovast úr einari grótflógv.

Niður á helluna liggur ein móflógv (*b*), hetta er tægingur ella myldingskendur tægingur, leivdir av tara síggjast í honum; flógvin er 35—32 cm til tjúkdar. Hesin mógvur tykist í ovaru helvt av grövini at vera órørdur, ongar leivdir vóru at finna og einki sást til, at hann var umgrivin. Niðasti partur av mónum var eyrur.

Niðast í móflónni, niður móti helluni varð funnin ein viðabulur og nökur sprek.

Tá grivið verður, skilir hin gamli svörðurin seg skilliga frá sum ein lind av samantrunkaðum grasleivdum og tílíkum gróðri.

Tað man vera beinast at nevna lagið oman á mónum (*c*) mókenda ífyllu. Hon er dökklitt 95—99 cm til tjúkdar, og tilfarið í henni nakað ymiskt; stundum er hon leirkend og stundum meira sandkend. Í hesari ífyllu sæst malargrót, ymisk djórabein og hópur av træsprekum við höggmerkjum eftir hvössum eggjarni. Eisini í hesari flónni sóust leivdir av tara og einstök skeljabrot. Tættast vóru viðasprekini í ovara parti av flónni. Gamlan svörð sást einki til ovast í hesari flónni.

Omaná ífylluni eru 74—85 cm av áburði (*d*), eyrur, smágrót og leir og ovast er so nýggjari áburður (*e*), 15 cm av eyri, leiri og royðugróti.

Sum tað sæst á 2. mynd, skiftir henda lagskipan vestureftir. Her er tað skilligt, at grivið hevur verið á botn fyrr, og man hetta hava verið um miðjuna av seinra parti í fyrru öld, tá hin gamli vegurin varð gjördur úti á Malarenda. Bæði á norður og suðurvegginum í grövini sæst skilliga, at flógv *c* og flógv *b* vóru gjögnumskornar á botn eftir eini beinari striku og ífylla koyrd aftur í. Niður ímóti helluni er her vestantil í grövini brúnlig mójörð, hon er



1. mynd. Skurður E—V. o—o: sjóvarmálin. Hæddirnar á hinum myndunum eru talmerktar her.
Section E—V. o—o: mean sea level.
The numbers refer to 2. and 3. mynd.



2. mynd. Skurður E—V.

Section E—V. o—o: mean sea level. a: rocky ground. b: peat (refer to plant remains p 54). c: hum. silt and filling (refer to plant remains and animal bones p 55). d: stony filling. e: tufaceous filling. The stippled vertical line, skurður N—S, refer to 3. mynd.



3. mynd. Skurður N—S.

Section N—S. Section at a right angle to stippled line, skurður N—S, 2. mynd.

skilliga umgrivin, stundum síggjast böklar av tægingi og tunn sandeygu í henni. Av og á eru træpetti og smábein at finna. Eingin skilligur svörður er omantil. Oman móti tí nýggja sementgarðinum sæst stórgrót, og er hetta helst gamli vegjaðarin oman móti sjónum ella/og baking av sementgarðinum.

SKURÐUR N—S (3. mynd). Skurðurin N—S er mátaður eftir hini prikkaðu linjuni á 2. mynd. Fláirnar eru her hinar somu sum á 2. mynd; (*a*) hella, (*b*) tægingur, (*c*) ífylla, (*d*) áburður og (*e*) nýggjari áburður. Í hesum skurði gongur hellan við lítlum halli norðurá.

LEIVDIR. *Flógv b.* Niðasta móflógvin (*b*) tóktist, sum nevnt, eystantil í skurðinum at vera óumgrivin mógvur; meðan tað var skilligt, at vestantil var grivið á botn. Ongar fornleivdir vóru at finna í mónum eystantil, har hann var órördur; ein viðabulur lá niður móti helluni, og man hetta vera rekatræ; hesum peikar tarin og ymsar smáleivdir av skeldýrum ímóti, og eisini er træið (sibirisk lerk ella gran) maðketið í støðum.

Beint á tí gamla svörðinum omaná móflónni lá eitt snarað viðjuband, og er hetta einasti nýtslulutur, vit komu fram á; hetta tykist hava ligið órört, síðan her var opin völlur. Snarað viðjubond eru fyrr funnin í Kvívík, Skálavík og Norðragötu, í öllum hesum stöðum í sambandi við toftir. Eyðkent er, at tey oftast tykjast liggja í leysknýttum knúti, og helst hava tey verið nýtt sum bond yvirhövur. — Í Kvívík hava vit vissu fyri, at eitt varð nýtt sum band ella gjörð um laggað ílát. Hetta bandið úr Nólsoy er snarað av 4 viðjugreinum, baraldarviðjum. Bandið er 35 cm langt samanknýtt og er 1,5—2 cm tvörturum.

Flógv c. Tað, sum funnið varð av djórabeinum og viðgjördum træsprekum, varð alt funnið eystantil í hesari flónni (*c*) og vestantil, har hon er umgrivin niður á botn. Bein vórðu funnin allan vegin uppeftir, men træsprekini vóru, sum frammanundan nevnt, tættast í ovara parti av flónni. Tað er at geva gætur, at skillig höggmerki eftir

hvössum eggjarni vóru at síggja á hesum viðasprekum, og at tey ikki eru tilevnað sum nýtslulutir. Hesi munnu tí vera avlop av smíði, sum er farið fram á staðnum. Tá ið vit vita, at Nólsoyingar bygdu fleiri skip á Malarenda [3,5] um miðjuna av fyrru öld (frá 1830unum), og at skipasmiðja teirra var tætt við henda grefstur, so er ikki illt at gita, hvaðan hesin viður ar komin.

Flógv d. Einstök djórabein vóru at finna á áburðarflónni (*d*), og eru tey sjálvandi frá allaryngstu tíð.

PLANTULEIVDIR. Plantuleivdir úr flógv b vóru:

FRUKTIR OG FRÆ

Potamogeton polygonifolius (Avlangt-Tjarnaks)
Carex sp. (Stör)
Rumex acetosa (Legg-Sýra)
Stellaria media (Opinekru-arvi)
Cerastium cfr. Edmondstonii (Stórblömt-Hösnagras)
Lynchis flos cuculi (Reyð-Akkuleya)
Atriplex patula (Fjöru-Rímblöðka)
Montia rivularis (Grýtu-Vatnsarvi)
Ranunculus repens (Skrið-Sólja)
Ranunculus acer (Svína-Sólja)
Caltha palustris (Mýru-Sólja)
Potentilla erecta (Börku-Mura)
Hippuris vulgaris (Vanligur-Vatnspíri)
Empetrum nigrum (Berjalyngur)
Leontodon autumnale (Heysthagasólja)

VIÐJUR

Juniperus communis (Baralds-Einiberviður)

REKATRÆ

Larix el. Picea (Sibiriskt lerkatræ ella gran)

LEYV

Mosi og tari.

Í flógv *c* vóru bert einstakar leivdir av hesum plantum at finna.

FRUKTIR OG FRÆ

Carex sp. (Stör)
Ranunculus sp. (Sólja)
Potentilla erecta (Börku-Mura)
Stellaria media (Opinekru-Arvi)
Lychnis flos cuculi (Reyð-Akkuleya)

LEYV

Mosi og tari.

DJÓRALEIVDIR. Tær djóraleivdir,ið komu úr flógv c vóru

Bos taurus domesticus (neyt):	Tvey lendageislabrot av kálvi.
— — — —	Brot av ovara parti av sperruleggi (radius); bringubeinsbrot.
Ovis aries (seyður):	Högri skalli (slóðin brotnað av) ♀
— — —	Vinstri skalli (slóðin brotnað av), gamal seyður. ♂ Heldur stórur sperruleggur við ongari knútu av ungum seyði. Riv, ovari partur burtur.
Gadus callarias (toskur):	Meginparturin av reiðuliga stórum toskarhövdi.
Fratercula artica (lundi):	Bringubeinsbrot.
Alca torda (álka):	Bringubeinsbrot.
— — —	—
Palacrocorax aristotelis (skarvur):	Sköltur og undirnev.
Puffinus puffinus (skrápur):	Sperruleggur (radius).

U. Möhl-Hansen, konservator, við hevur kannað beinini, veita vit okkara bestu tökk. Eisini takka vit *Knud Jessen*, professara, fyri hjálpsemi.

ALDUR. Taka vit nú aldursmeting *A. W. Bröggers* upp til umhugsunar, so er at minnast, at hann byggir aldursmeting sína á tað grundarlag, at frásögnin er rött, og at beinini lógu 3 m undir órördum mógvi. Orðarætt sigur hann soleiðis[2]: »Vit hava fyrr hildið, at so djúpur mógvur, sum her er um at röða, var ið hvussu er eldri enn bygging Föroya, samb. fundin í Vágsbotni: Hava vit nú her ein skölt av vanligum neyti og eitt herðablað av vanligum hundi, umframt hvalabeinið í einum slíkum dýpi, og vörildin er nátúrligur mógvur og ikki umskumpað av skurði, so verður at leggja í geyma annaðhvört má fólk við fenaði hava verið í Föroyum ógviliga *langt* undan teim norsku landnámsmonnunum, ella eisini veksur mógvur nógv skjótari, enn vit fyrr hava hildið (tað seinasta havi eg lyndi til at halda). Og seinri sigur hann[2]: Øll líkindi eru tó til, at hesir djórasköltar eru *grivnir niður* í tann gamla mógvin, og tað er líkast til, at fundurin er ein *offurfundur*, og at hann kann vera frá fyrst í landnámstíðini.

Í niðastu móflónni vóru, sum frammanundan nevnt, eingir fornlutir funnir; hvört har var ruddiliga grivið og leitað, kom einki fram uttan áðurnevnda rekatræ. Tað er líkt til, at henda móflógvin er hin sama, sum rekatræið kom úr í fyrsta grefstri, tí plantutilfarið er átökt tí, *Jessen* sigur frá. Næsta flógvin uppeftir er so hin mókenda ífyllan, og er tað ivaleyst í hesari flónni, beinini eru funnin, — eisini í fyrra grefstri.

Tá tað var nevnt, at hesi bein vóru funnin á botni, so man hetta hava verið vestantil, har mógvurin var umgrivin frammanundan. Tað fer nú at vera greitt, at tá ið vit finna hópin av træsprekum, ið ætlast kunnu vera komin frá skipasmíði um miðjuna av fyrru öld ^{3,5} oman um hálva hesa lindina, so fara teir lutir, ið lagstir eru í henda part av flónni at vera um sama aldur.

Bein eru at finna niðari í hesi flónni við, heilt nær oman móti tí gamla svörðinum, vit nevndu, men tá ið öll henda flógvin (*c*) er nakað eins til útsjóndar allan vegin uppeftir,

og eingin svörður ella tílíkt er, ið skilir hana sundur, so man tað vera beint at halda, at plássið hevur staðið opið frá teirri tíðini, hesin svörður var völlur, og til fyrsti vegur varð gjördur. Markið *upp í tíðina* av hesari flónni eigur tí at vera sett um miðjuna, kanska nakað aftaná miðjuna av seinastu öld.

Markið *aftur í tíðina* mega vit seta við hin gamla svörðin, har viðjubandið lá. Sum nevnt eru tílík viðjubond funnin í tilætlaðum miðaldarfundum í Föroyum fyrr, men at gera nakra aldursmeting eftir henni, ber kortini ikki til.

Miða vit okkum eftir teirri sökking, sum *Jessen*[4] sigur frá, so er líkast til, at afturmarkið eigur at vera sett til miðöldina (norröna miðöld) og ikki til fyrst í landnámstíðini, sum *Brögger*[2] heldur.

Rokna vit eftir niðastu flónni, móflónni (*b*), so vita vit, at niðurmark hennara undir sementgarðinum er 65 cm undir sjóvarmálanum. Leingja vit linjurnar báðar (undir og omaná mónum) úteftir, so kunna vit siga, at har hesar linjur bera saman, er sökkingin okkurt um 100 cm, um so er, at mógvurin rökkur so langt út. Mógvurin hevur sjálvandi ligið omanfyri sjóvarmálan, tá ið hann varð tilgjördur, men ivaleyst stutt omanfyri sjóvarmálan, hetta miðja bæði rekatrö, tari og smáleivdir av skeljadjórum ímóti.

Sökkingin á staðnum fer tí at liggja millum 65 og o. u. 100 cm; meta vit hetta samanvið úrslit *Jessens*[4], so eigur markið aftur í tíðina, sum fyrr nevnt, at verða sett til miðskeiðis í miðöld.

Fara vit nú at spyrja, hvussu eru hesi bein komin har á staðið, tey vórðu funnin; eru tey grivin niður? eru tey blakað har? eru tey rikin upp av sjógv ella fokin saman? So er hartil at siga: Niðurgrivin eru tey valla, til tess liggja tey eru ov spjadd, ein sköltur her, eitt riv har o. s. fr. Burturtveitt har saman við ruski eru tey neyvan, tí at eingin öska, brot av nýtslulutum ella annað vanligt burturkast varð funnið. Helst man hetta vera rikið upp av sjógv ella sumt kanska fokið saman.

Hyggja vit aftur at 2. og 3. mynd, so sæst, at hellan gongur við lítlum halli oman móti sjónum og norðureftir. Hetta sæst eisini á landslagnum millum Malhellurnar. — Vit fara tí at halda, at her hevur einaferð verið ein lægd og kanska seinri eitt innvik, har hetta alt er rikið upp. Rekatræið, tarin og skeldýraleivdirnar miðja eisini móti hesum.

SUMMARY

I.

In autumn 1926 drift wood and some animal bones were found in the soil on the island of Nólsoy. Detailed investigations were not carried out at the time, but according to men working on the site, *Brögger*[2] thought that they had possibly come across the remains of a sacrifice from the early period of the colonisation of the Faroes.

II.

Investigations were undertaken at the spot in the summer of 1953; two sections were cut some two metres east of where the bones and drift wood were previously found: E—V (Fig. 1 and 2) and N—S (Fig. 3) and the strata examined. Taking into account the subsidence known to have taken place and comparing with *Jessen*[4] and *Brögger*[2] we conclude that the *terminus ad quem* should not be fixed earlier than the middle of the (Norse) Middle Ages and that the site appears to have been exposed until the 19th century. It may be thought that these bones had been washed up or thrown together where they were found; remains of seaweed and shell-fragments indicate this supposition.

BÓKMENTIR

1. *Rasmussen, R.:* Funnar fornleivdir í Nólsoy. F. F. 1927, nr. 3.
2. *Brögger, A. W.:* Lögtingssöga Föroya. 1. Bók. Tórsh. 1937, bls. 175 f.
3. *Rasmussen, R.:* Föroyskt skipasmíð í forðum. F. F. 1927 nr. 27.
4. *Jessen, Knud:* De færöske Mosers Stratigrafi. 17de skandinaviske Naturforskermöde, Göteborg 1923.
5. *Nolsöe, Poul:* Skipabygging í Nólsoy. Varðin IX. bls. 100 f.